FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

# Innihald


Uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2025 .... 3

Inngangur .... 14

Lýsing av gongdini í búskapinum .... 15

*Roknast kann við óbroyttum ískoyti til vøksturin frá útflutningsvinnunum í 2024 og 2025* .... 18
*Gongdin á arbeiðsmarknaðinum* .... 19
*Eftirspurningur og brúkaraprísir* .... 21
*Gongdin í til- og fráflyting* .... 24

*Viðskifti við útlond, handils- og gjaldsjavni* .... *27*

*Heimsbúskapurin* .... *28*

*Almenn fíggjarmál* .... *30*



Tinganes • Box 2039 • FO-110 Tórshavn
☏ (+298) 35 20 20 • fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

Løgtingið

**Tórshavn**, 22. mars 2024
Mál nr.: 24/04393

**Uppskot**

**til**

**samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2025**

Við hesi løgtingssamtykt tekur Løgtingið undir við, at samlaði útreiðslukarmurin í løgtingsfíggjarlógini fyri 2025 verður 7.537,4 mió. kr. Rakstrarkarmurin verður 6.937,4 mió. kr., og løgukarmurin verður 600 mió. kr. Samlaði inntøkukarmurin verður 7.546,6 mió. kr.

Framskrivaða úrslitið í løgtingsfíggjarlógini fyri 2025 er avlop á 9,2 mió. kr. Framskrivaðu játtanarkarmarnir fyri 2025 vísa, at neyðugt verður við átøkum, serstakliga á útreiðslusíðuni. Átøk verða gjørd fyri 35 mió. kr. í 2025. Eftir átøkini at betra úrslitið og at rætta flytingar í Búskapargrunnin verður úrslitið fyri 2025 eitt hall á 12,6 mió. kr. Í talvuni niðanfyri eru samlaðu játtanarkarmarnir fyri 2025 býttir á greinar.

**Játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2025**

| *Mió. kr.* | **Rakstur** | **Løgur** |
|---|---|---|
| § 1 Løgtingið | 87,7 | 0,0 |
| § 2 Løgmansfyrisitingin | 45,9 | 130,0 |
| § 3 Fíggjarmál | 467,9 | 42,6 |
| § 5 Fiskivinnu- og samferðslumál | 509,7 | 252,3 |
| § 6 Uttanríkis- og vinnumál | 199,7 | 0,0 |
| § 7 Barna- og útbúgvingarmál | 1.410,3 | 64,6 |
| § 11 Heilsumál | 1.731,4 | 31,3 |
| § 12 Almanna- og mentamál | 2.360,5 | 79,2 |
| § 14 Lógarmál | 51,6 | 0,0 |
| § 18 Umhvørvismál | 72,7 | 0,0 |
| ***Útreiðslur tilsamans*** | **6.937,4** | **600,0** |
| **Útreiðslukarmur** | **7.537,4** | |
| **Inntøkukarmur § 20** | **7.546,6** | |
| **Framskrivað RLÚ-úrslit** | **9,2** | |
| **Átøk at betra úrslitið** | **35,0** | |
| **Átak at rætta flytingar í Búskapargrunnin** | **-56,8** | |
| **RLÚ-úrslit við átøkum** | **-12,6** | |

**Viðmerkingar**
Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum leggur við hesum vegna landsstýrið fram uppskot til løgtingssamtyktar um játtanarkarmar fyri løgtingsfíggjarlógina í 2025.

Við játtanarkørmunum, ið sambært § 8, stk. 1 í løgtingslóg um landsins játtanarskipan skulu verða lagdir fram innan 1. apríl, ásetir Løgtingið yvirskipaða fíggjarpolitiska karmin fyri komandi árið. Játtanarkarmarnir eru avgerandi fyri, hvussu stórt fíggjarliga rásarúmið verður komandi ár.

Endamálið við framskrivaðu játtanarkørmunum fyri 2025-2029 er, at framskrivingarnar vísa mettu og framskrivaðu gongdina í útreiðslum og inntøkum landsins næstu 5 árini við galdandi lóggávu og verandi virksemisstigi.

Framskrivingar fyri 2025 til 2029 vísa, at landskassin fer at hava avlop komandi árini. Í 2025 verður tó eitt lítið hall eftir, at átøk at betra úrslitið og at rætta flytingar í Búskapargrunnin eru framd.

Fyri at betra um úrslitini og haldføri landskassans komandi árini ætlar landsstýrið at fremja átøk, sum skulu betra javnvágina millum inntøkur og útreiðslur hjá landinum. Avlopini kunnu bæði brúkast til at minka landskassaskuldina, leggja upp fyri broyttari aldurssamanseting og til at standa ímóti við, tá ið búskaparliga verri tíðir koma.

Ætlanin er at broyta uppgerðina av inntøkunum frá avgjøldum á tilfeingisvinnurnar soleiðis, at frá 2025 fer ein størri partur beinleiðis í Búskapargrunnin. Samstundis verða mørkini fyri útgjaldi úr grunninum broytt við 100 mió. kr. fyri ávikavist tøkugjøld og avgjøld á fiskatilfeingi. Tað merkir, at fyri inntøkur frá avgjøldum frá alivinnuni verður markið broytt úr 150 mió. kr. upp í 250 mió. kr., og fyri avgjald frá fiskivinnuni verður markið broytt úr 250 mió. kr. upp í 350 mió. kr.

Skulu nýggjar rakstrarraðfestingar koma afturat næstu árini, verður neyðugt at økja um átøkini samsvarandi.

**Framskrivingarfortreytir**
Niðanfyri verður greitt frá fortreytunum fyri ymisku framskrivingunum.

**Rakstrarjáttanir og lógarbundnar játtanir**
***Lønarframskrivingar***
Framskrivað verður fyri kendar lønarhækkingar í 2025. Flestu almennu lønarsáttmálarnir eru galdandi fram til 30. september 2025. Fyri níggju mánaða tíðarskeiðið er lønarhækkingin kend, og er 4,75%. Mett verður, at lønarhækkingin frá 1. oktober 2025 fer at lækka aftur, og verður ásett til 3%. Framskrivað verður vektað við 4,31% í 2025.

Fyri ávísar játtanir, har serstøk lønarviðurskifti gera seg galdandi, verður framskrivað fyri hetta, so sum sáttmálasett ístaðin fyri tænastumenn.

***Prísvøkstur***

Prísvøkstur verður ikki framskrivaður, men tó verður hetta gjørt fyri ávísar játtanir, har stórur prísvøkstur vanliga er.

***Javning av almannaveitingum og lestrarstuðli***

Javningin av almannaveitingum, pensjónum og lestrarstuðli verður vektað helvt um helvt við lønarvøkstri og prístalsvøkstri árið undan fram til 1. oktober. Er lønarvøksturin lægri enn prístalsvøksturin, verður bert javnað við lønarvøkstrinum. Javningarprosentið fyri 2025 verður ásett í kunngerð, men verður mett til 3,5%, sum er vektað 4,2% í kendum lønarvøkstri og 2,8% í mettum prísvøkstri, sum er á sama støði sum síðst kunngjørdi prísvøkstur.

***Ársins prísir 2025, men fastir (realir) prísir 2026-2029***

Sum vanligt er í játtanarkørmunum, verður framskrivað í ársins prísum í 2025, men árini 2026-2029 verður framskrivað í føstum prísum. Tað merkir, at frá 2026 til 2029 verður ongin lønar- ella prísvøkstur íroknaður.

***Bundnar raðfestingar***

Nýtt ella broytt virksemi skal meginregluliga játtast fyri fult ár, tá ið tað byrjar. Er tó talan um virksemi, sum ikki er tikið við fyri fult ár í 2024, skal hetta framskrivast til fult ár fyri 2025. Framskrivast skal á sama hátt fyri virksemi, sum broytist stigvíst í tíðarskeiðnum 2025-2029, sum til dømis útrulling av nýggjari útbúgving ella eykaflokkum. Øvugt skal eisini framskrivast fyri virksemi, sum ætlast at enda ella minka í vavi í tíðarskeiðnum 2025-2029.

***Fólkavøkstur og broytt fólkasamanseting***

Fólkavøkstur og broytt fólkasamanseting hava við sær, at neyðugt er at taka hædd fyri hesum í framskrivingunum av ávísum játtanum fyri at verandi virksemisstig verður varðveitt.

***Rentustøði og oljuprísur***

Játtanarkarmarnir verða gjørdir við verandi rentustøði og oljuprísi. Hetta er ein óvissa í játtanarkørmunum, tí rentustøðið og oljuprísurin kunnu broytast, og harvið kunnu útreiðslur landskassans til rentustuðul, og útreiðslur til olju eisini broytast.

***Fólkavøkstur, broytt fólkasamanseting og aðrar virksemisbroytingar***

Í mun til galdandi lóggávu verður framskrivað fyri virksemisbroytingar vegna t.d. fólkavøkstur og broytta fólkasamanseting, og metingar av útreiðslugongdini út frá kendum viðurskiftum, sum hava við sær virksemisbroytingar.

**Stuðulsjáttanir**

Meginreglan er, at stuðulsjáttanir verða framskrivaðar við óbroyttari upphædd, uttan so, at serstøk viðurskifti gera seg galdandi, so sum uppathaldandi virksemi ella bindandi avtala um stuðulshækking, um tað so er eingangs ella varandi.

| Talva: Útvaldar játtanir við størstum rakstrarvøkstri fyri 2024-2029 | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Mió. kr.* | **FL2024** | **JK2025** | ***2026*** | ***2027*** | ***2028*** | ***2029*** |
| Rakstrarútreiðslur, §1-§18: | | | | | | |
| Tænastumannaeftirlønir | *170,0* | *178,0* | *185,5* | *192,5* | *199,0* | *205,0* |
| Rentustuðul | *85,0* | *85,0* | *85,0* | *85,0* | *85,0* | *85,0* |
| Strandfaraskip landsins | *239,7* | *235,4* | *235,4* | *235,4* | *235,4* | *235,4* |
| Fólkaskúlin | *457,4* | 487,8 | 490,3 | 492,3 | 494,3 | 495,8 |
| Fróðskaparsetur Føroya | *156,8* | 168,4 | 171,7 | 173,9 | 173,9 | 173,9 |
| Lestrarstuðul | *131,6* | *137,1* | *137,1* | *137,1* | *137,1* | *137,1* |
| Heilsutrygdarveitingar | *279,2* | *307,1* | *322,5* | *338,6* | *355,5* | *373,3* |
| Landssjúkrahúsið | *958,1* | 1.013,8 | 1.027,8 | 1.042,0 | 1.056,5 | 1.071,2 |
| Serstakur sjúkrahúsheilivágur | *70,0* | 73,5 | 76,0 | 78,7 | 81,4 | 84,3 |
| Trivnaðartænastur | *474,3* | 500,0 | 507,0 | 514,1 | 521,1 | 528,2 |
| Arbeiðsfremjandi tiltøk | *149,8* | 173,7 | 181,1 | 185,4 | 191,1 | 196,8 |
| Fólkapensjón | *699,1* | 748,0 | 774,0 | 804,5 | 837,0 | 872,4 |
| Fyritíðarpensjón | *317,5* | 338,3 | 348,0 | 357,8 | 367,7 | 377,6 |
| **Útvaldar rakstrarútreiðslur tilsamai** | ***4.188,4*** | ***4.446,1*** | ***4.541,4*** | ***4.637,2*** | ***4.735,1*** | ***4.836,0*** |
| Lutfall (útvaldar/rakstur tilsamans) | 64% | 64% | 64% | 65% | 65% | 66% |
| **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | ***6.583,5*** | ***6.937,4*** | ***7.043,3*** | ***7.144,4*** | ***7.248,6*** | ***7.361,5*** |

### *Tænastumannaeftirlønir*
Framskrivað er við mettari árligari nettotilgongd av tænastumonnum, sum fara frá fyri aldur. Størsta tilgongdin síðstu árini hevur verið lærarar, men tann tilgongdin er avtakandi, tí lærarar síðani 1998 ikki eru settir sum tænastumenn.

### *Stuðul til rentuútreiðslur*
Rentustøðið er hækkað nógv síðstu árini. Útreiðslur landskassans til stuðul til rentuútreiðslur eru vaksnar úr 44 mió. kr. í 2021 upp í mettar 85 mió. kr. í 2024. Útlit eru fyri, at rentustøðið ikki longur er hækkandi, men kanska heldur fer at lækka, nú prísvøksturin aftur er komin niður á eitt lágt støði. Framskrivað er við óbroyttum rentustøði fyri 2025 og frameftir.

### *Strandfaraskip Landsins*
Lagt er upp fyri, at oljuprísurin er á sama støði sum í 2024, umframt lønarhækkingar. Farmasiglingin á Suðuroyarleiðini við Smyrli er skipað øðrvísi við plássbíleggingarskipan til bæði ferðafólk og farm.

### *Fólkaskúlin*
Játtanin til fólkaskúlan er í størstan mun læraralønir. Framskrivað er við hægri pensjónsútreiðslum, sum stava frá, at sáttmálasettir lærarar verða settir í staðin fyri tænastumenn, ið fáa sína pensjón útgoldna av játtanini til tænastumannaeftirlønir.

### *Fróðskaparsetur Føroya*
Framskrivað er við framhaldi av upptøku tvær ferðir um árið til útbúgvingarnar í námsfrøði og sjúkrarøktarfrøði.

### *Lestrarstuðul*
Játtanin er framskrivað í sambandi við økt virksemi á Fróðskaparsetri Føroya, sum er vegna fleiri lesandi innan námsfrøði, sjúkrarøktarfrøði og aðrar útbúgvingar.

***Heilsutrygdarveitingar***
Í mun til mettu nýtsluna í 2024 er játtanin framskrivað við 7% í 2025 og við 5,5% í føstum prísum frá 2026 til 2029. Framskrivingin er vegna fult virksemi í 3 nýggjum kommunulæknaviðtalum, og annars vegna fólkavøkstur og broytingar í fólkasamanseting.

***Landssjúkrahúsið***
Framskrivað er við 1% vegna fólkavøkstur, við prísvøkstri á 3%, umframt at serviðgerð uttanlands, flutningur og uppihald, og sjúklingahotellið Tórshavn eru framskrivað við 5% í 2025 og við 3,5% í føstum prísum frá 2026 til 2029. Framskrivað er eisini við, at virksemi verður í H-bygningum, tó ikki fult virksemi.

***Serstakur sjúkrahúsheilivágur***
Framskrivað er við 5% í 2025 og við 3,5% í føstum prísum frá 2026 til 2029.

***Trivnaðartænastur***
Framskrivað er við mettari nettotilgongd av tungum brúkarum. Í 2025 er framskrivað við, at ein nýggjur bústovnur, sum ikki er fult inni í 2024, verður fult tikin við í 2025.

***Arbeiðsfremjandi tiltøk***
Framskrivað er við mettari nettotilgongd av brúkarum í skipanini. Nettotilgongdin er vaksandi. Veitingarnar eru framskrivaðar við lønarhækking hjá arbeiðarafeløgunum í 2025. Framskrivað er eisini við, at kravda pensjónsgjaldið hækkar 1%-stig árliga fram til 2026, tá komið er uppá 12%.

***Fólkapensjón***
Framskrivað er við mettari nettotilgongd av pensjónistum. Framskrivað er við, at veitingarnar verða javnaðar við 3,5% í 2025.

***Fyritíðarpensjón***
Framskrivað er við mettari nettotilgongd av pensjónistum. Framskrivað er við, at veitingarnar verða javnaðar við 3,5% í 2025.

**Løgujáttanir**

***Samtyktar løguverkætlanir***
Framskrivað verður sambært ætlaða útreiðsluprofilinum, soleiðis sum hann er tikin við í verklagslóg, viðmerkingunum til verklagslóg og viðmerkingunum til løgujáttanina í fíggjarlógini fyri 2025.

***Verkætlanir sambært langtíðarløguætlanini***
Aðrar verkætlanir verða framskrivaðar sambært langtíðarløguætlanini, soleiðis at framskrivað verður við føstum løgukarmi á 600 mió. kr. øll árini 2025 til 2029.

KT-verkætlanir og stuðul til løguverkætlanir hjá kommunum verða tiknar við sum løgujáttanir. Somuleiðis eru í løgukarminum innroknaðar løgukendar útreiðslur, so sum partapeningur í feløg, sum fremja størri samferðsluverkætlanir og løgustuðul til sjálvsognarstovnar.

| **Talva: Løgukarmur fyri 2024-2029** | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Mió. kr.* | ***FL2024*** | **JK2025** | **2026** | **2027** | **2028** | **2029** |
| **Løguútreiðslur tilsamans*** | ***712,2*** | **600,0** | **600,0** | **600,0** | **600,0** | **600,0** |

*Løgujáttanir umframt løgukendar útreiðslur

***Tunnil til Dals***
Arbeitt verður við at gera tunnil til Dals. Byrjað varð upp á verkætlanina á vári 2019. Arbeiðið verður mett at verða liðugt í 2026.

***Fjøruvegurin í Runavík***
Sambært heimildarlóg stuðlar landið verkætlanini til nýggjan Fjøruveg í Runavík við í mesta lagi 55 mió. kr. Arbeiðið er ígongd.

***Miðnám á Kambsdali***
Sambært galdandi verklagslóg er kostnaðurin mettur til 94 mió. kr. Verkætlanin verður eftir ætlan liðug í 2025.

***Klaksvíkar sjúkrahús***
Sambært galdandi verklagslóg um at um- og útbyggja læknahúsini (gula húsið) á Klaksvíkar sjúkrahúsi er kostnaðurin mettur til 16 mió. kr. Arbeitt verður við at gera uppskot til verklagslóg um starvsfólkabygningin.

***Bústovnar***
Settar verða 50 mió. kr. av árliga til nýggjar verkætlanir frá 2025 til 2029.

***Stórhøllin í Hoyvík***
Sambært heimildarlóg um stuðul til at byggja stórhøll í Hoyvík letur landið stuðul á 30 mió. kr. í árunum 2022 til 2025.

***Eystur- og Sandoyartunlar***
Roknað verður við 27 mió. kr. í ferðsluveðhaldi í 2025 og 18 mió. kr. í 2026. Væntandi fer ferðslan gjøgnum Eystur- og Sandoyartunlar at vaksa so líðandi, soleiðis at veðhaldið bert er effektivt í styttri áramál.

***Suðuroyartunnilin***
Í 2022 vórðu játtaðar 4 mió. kr. til at stovna P/F Suðuroyartunnilin. Játtaðar eru 10 mió. kr. í 2023 og aftur í 2024 til at gera forkanningar. Arbeitt verður í løtuni við at finna ein hóskandi fíggingarleist. Í langtíðarløguætlanini eru 100 mió. kr. settar av í 2025 og árini frameftir.

***Størri KT verkætlanir***
Fleiri størri KT verkætlanir eru ígongd ella fara ígongd komandi árini. Talan er um dagføring av skattaskipanini hjá TAKS, nýggja talgilda heilsuskipan, umsitingarskipan til skúlaverkið og Talgildu Føroyar 2.0. Í 2025 verða játtaðar um 70 mió. kr. samanlagt til verkætlanirnar.

***Fróðskaparsetrið (kampus)***

Verkætlanin snýr seg um at umvæla verandi bygningar og at gera ein nýggjan felagsbygning. Verklagslóg um projektering av felagsbygninginum er løgd fyri Løgtingið. Kostnaðurin kann í mesta lagi vera 31 mió. kr. Eisini er verklagslóg galdandi fyri umvæling av einari lon í verandi bygningum. Útreiðslurnar kunnu í mesta lagi vera 24 mió. kr.

**Fyritreytir fyri inntøkujáttanum og rentum**

Inntøkurnar verða framskrivaðar við støði í søguligum inntøkutølum og teimum fyritreytum, sum eru kendar. Fyri ávísar inntøkujáttanir verður í framskrivingunum lagt upp fyri serligum viðurskiftum í einstøkum vinnugreinum.

Stórur partur av inntøkusíðuni á fíggjarlógini er skattir og avgjøld, sum verða stýrd av búskaparligu konjunkturgongdini í samfelagnum, og sum í stóran mun fylgja vøkstrinum í BTÚ.

***Ársins inntøkuvøkstur 2025, men fastur (realur) inntøkuvøkstur 2026-2029***

Sum vanligt er í játtanarkørmunum verður framskrivað í ársins prísum í 2025, men árini 2026-2029 verður framskrivað í føstum prísum. Tað merkir, at frá 2026 til 2029 verður framskrivað við realum inntøkuvøkstri.

***Rentustøði***

Fyritreytirnar fyri renteframskrivingunum eru metta gongdin í landskassaskuldini og útlitini fyri rentugongdina. Hetta er ein óvissa í játtanarkørmunum, tí rentustøðið kann broytast, og harvið kunnu útreiðslur landskassans til rentuútreiðslur av skuldini eisini broytast.

**Talva: Útvaldar játtanir við størstum inntøkuvøkstri fyri 2024-2029**

| *Mió. kr.* | **FL2024** | **JK2025** | **2026** | **2027** | **2028** | **2029** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkur, §20: | | | | | | |
| Vanligur landsskattur | *2.075,0* | 2.140,0 | 2.185,0 | 2.230,0 | 2.275,0 | 2.320,0 |
| Felagsskattur | *460,0* | 485,0 | 500,0 | 510,0 | 520,0 | 530,0 |
| Kapitalvinningsskattur | *335,0* | 400,0 | 410,0 | 415,0 | 420,0 | 425,0 |
| Meirvirðisgjald | *2.110,0* | 2.195,0 | 2.240,0 | 2.285,0 | 2.330,0 | 2.375,0 |
| Loyvisgjald á alivinnu | *354,8* | 405,0 | 425,0 | 450,0 | 475,0 | 500,0 |
| Avgjald á fiskatilfeingi | *530,9* | 485,0 | 495,0 | 500,0 | 505,0 | 510,0 |
| Útluting frá alm. partaf. og grunnum | *130,0* | 130,0 | 120,0 | 121,0 | 122,0 | 123,0 |
| Heildarveiting | *591,8* | 566,8 | 541,8 | 541,8 | 541,8 | 541,8 |
| **Útvaldar inntøkur tilsamans** | ***6.587,5*** | **6.806,8** | **6.916,8** | **7.052,8** | **7.188,8** | **7.324,8** |
| Lutfall (útvaldar/inntøkur tilsamans) | *90%* | 90% | 90% | 90% | 90% | 90% |
| **Inntøkur tilsamans** | ***7.299,9*** | **7.546,6** | **7.658,1** | **7.815,6** | **7.973,6** | **8.128,6** |

Størstu inntøkukeldurnar hjá landinum eru vanligi landsskatturin og meirvirðisgjaldið, sum tilsamans eru um 60% av samlaðu inntøkunum hjá landskassanum.

***Vanligur landsskattur***

Í framskrivingini er lagt upp fyri samtykta skattalættanum, og síðani er hækkað við 4%. Árini 2026 til 2029 er roknað við vøkstri í føstum prísum uppá um 2%.

***Felagsskattur***
Roknað verður við varisligum vøkstri í felagsskattinum næstu árini.

***Kapitalvinningsskattur***
Roknað verður við varisligum vøkstri í kapitalvinningsskattinum næstu árini.

***Meirvirðisgjald***
Viðvíkjandi meirvirðisgjaldinum er roknað við vøkstri á um 4% í 2025 sammett við metingina í løgtingsfíggjarlógini fyri 2024. Árini 2026 til 2029 er roknað við vøkstri í føstum prísum uppá um 2%.

***Loyvisgjald á alivinnu***
Framskrivað er eftir galdandi lóggávu. Roknað verður við, at tøkan kann hækka 5% árliga næstu árini og sostatt eisini loyvisgjaldið á alivinnu. Roknað verður við framhaldandi góðum prísum á aldum laksi á heimsmarknaðinum.

***Avgjald á fiskatilfeingi***
Framskrivað er eftir galdandi lóggávu. Óvissa er um avgjaldið á fiskatilfeingi næstu árini, serliga um semjurnar millum strandarlondini um uppsjóvarfisk. Roknað verður við umleið somu inntøkum komandi árini.

***Útluting frá almennum feløgum og grunnum***
Roknað verður við vinningsbýti frá feløgum og grunnum sum landið eigur heilt ella partar av. Hesi eru millum annað Føroya Banki, Føroya Tele, Atlantsflog, Smyril-Line, Elektron og Realurin.

***Heildarveitingin***
Avtalað er við donsku stjórnina, at heildarveitingin lækkar 25 mió. kr. árliga til og við 2026, tá upphæddin verður 542 mió. kr.

**Átøk at betra úrslitið**
Fíggjarmálaráðið mælir til, at rakstrarútreiðslurnar hjá landinum hækka í mesta lagi um 4% árliga, sum samsvarar áleið við metta vøksturin í bruttotjóðarútøkuni í 2025 (í ársins prísum).

Við hesum verður vøksturin í útreiðslunum hjá landinum ikki hægri enn samlaði væntaði vøksturin í bruttotjóðarútøkuni (í ársins prísum), men samstundis skal útreiðsluvøksturin hjá landinum fevna um lønarhækkingar, hægri veitingar og virksemisøkingar (demografiskar broytingar og fólkavøkstur).

Framskrivingin av útreiðslunum fyri 2025 vísir ein vøkstur á 5,4% í mun til samtyktu fíggjarlógina fyri 2024.

Fíggjarmálaráðið ásannar, at tað verður trupult fremja átøk fyri 1,4% í 2025, og tí verður skotið upp at fremja átøk fyri 35 mió. kr. árliga, sum svara til eina árliga lækking á 0,5% av rakstrarútreiðslunum. Skulu nýggjar rakstrarraðfestingar koma afturat næstu árini, verður neyðugt at fremja átøk, sum samsvara við raðfestingarnar.

Herumframt kunnu átøk at økja um inntøkurnar verða framd.

Hesi átøk at betra úrslitið skulu brúkast til at minka skuldina, leggja upp fyri broyttari aldurssamanseting og til at standa ímóti við, tá ið búskaparliga verri tíðir koma.

**Uppskot til játtanarkarmar 2025-2029**

Uppskotið til játtanarkarmar byggir á fíggjarlógina fyri 2024, umframt politisk átøk, sum eru gjørd síðani. Í talvuni niðanfyri er uppskotið til játtanarkarmar fyri árini 2025 til 2029 útgreinað og býtt á greinar og ár.

**Talva: Útgreinaðir játtanarkarmar fyri 2024-2029**

| *Mió. kr.* | ***FL2024*** | **JK2025** | **2026** | **2027** | **2028** | **2029** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur, §1-§18: | | | | | | |
| § 1 Løgtingið | *85,5* | 87,7 | 88,8 | 91,7 | 89,2 | 89,7 |
| § 2 Løgmansfyrisitingin | *45,6* | 45,9 | 46,1 | 47,0 | 46,0 | 46,6 |
| § 3 Fíggjarmál | *453,9* | 467,9 | 475,4 | 482,4 | 491,9 | 500,9 |
| § 5 Fiskiv.- og samferðslumál | *504,3* | 509,7 | 509,7 | 509,7 | 509,7 | 511,7 |
| § 6 Uttanríkis- og vinnumál | *188,4* | 199,7 | 199,4 | 199,4 | 199,7 | 200,1 |
| § 7 Barna- og útbúgvingarmál | *1.333,9* | 1.410,3 | 1.416,9 | 1.421,1 | 1.423,1 | 1.424,6 |
| § 11 Heilsumál | *1.629,3* | 1.731,4 | 1.765,8 | 1.801,3 | 1.838,0 | 1.876,0 |
| § 12 Almanna- og mentamál | *2.221,8* | 2.360,5 | 2.415,1 | 2.467,6 | 2.526,7 | 2.587,6 |
| § 14 Lógarmál | *49,7* | 51,6 | 53,6 | 51,6 | 51,6 | 51,6 |
| § 18 Umhvørvismál | *71,1* | 72,7 | 72,7 | 72,7 | 72,7 | 72,7 |
| **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | ***6.583,5*** | **6.937,4** | **7.043,3** | **7.144,4** | **7.248,6** | **7.361,5** |
| **Løguútreiðslur, §1-§18*** | ***712,2*** | **600,0** | **600,0** | **600,0** | **600,0** | **600,0** |
| **Inntøkur** | ***7.299,9*** | **7.546,6** | **7.658,1** | **7.815,6** | **7.973,6** | **8.128,6** |
| **Framskrivað RLÚ-úrslit** | ***4,1*** | **9,2** | **14,8** | **71,2** | **125,0** | **167,1** |
| **Átøk at betra úrslitið** | | **35,0** | **70,0** | **105,0** | **140,0** | **175,0** |
| **Átak at rætta flytingar í Búskapargrunnin** | | **-56,8** | **-58,1** | **-44,4** | **-35,8** | **-45,0** |
| **RLÚ-úrslit við átøkum** | ***4,1*** | **-12,6** | **26,6** | **131,8** | **229,1** | **297,0** |

**Viðm:** Tølini fyri 2024 og 2025 eru í ársins prísum, og tølini fyri 2026-2029 eru í føstum prísum. Tað vil siga, at lønar- og prísvøkstur er ikki íroknaður, hvørki á útreiðslu- ella inntøkusíðu landskassans. Tølini fyri 2024 eru sambært samtyktu fíggjarlógini.

* Í løgukørmunum eru innroknaðar løgukendar útreiðslur.

**Skjal hjálagt**

Skjal 1: Búskaparfrágreiðing I, mars 2024

Fíggjarmálaráðið, 22. mars 2024

Ruth Vang

landsstýriskvinna

/Bjarni Askham Bjarnason

# Inngangur

Sambært § 8 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan skal frágreiðing (Búskaparfrágreiðing I), sum lýsir og metir um búskaparstøðu Føroya, herímillum tann almenna geiran, verða løgd við uppskotinum til løgtingssamtykt um játtanarkarmar. Uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar fyri fíggjarlógina næsta ár skal leggjast fram fyri 1. apríl.

Uppskotið til løgtingssamtykt um játtanarkarmar fyri løgtingsfíggjarlógina fyri 2025 byggir í høvuðsheitum á samtyktu løgtingsfíggjarlógina fyri 2024 (løgtingsmál nr. 17/2023). Dagførdar framskrivingar eru gjørdar av inntøkum og útreiðslum.

Frágreiðingin er sett soleiðis saman, at fyrst er stutt lýsing av gongdini í føroyska búskapinum, síðani av altjóða búskapinum og at enda av almenna búskapinum.

## Lýsing av gongdini í búskapinum

Fíggjarmálaráðið metir, at vøksturin verður nakað lægri í 2024 enn í 2023. Nevnast skal kortini, at óvissan um útlitini fyri tey næstu 1-2 árini er stór. Hagtøl vísa, at stórur vøkstur var í búskapinum í 2022, men at vøksturin minkaði í 2023. Mynd 1 niðanfyri vísir gongdina í bruttotjóðarúrtøkuni árini 2005 til 2022 og metingar fyri árini 2023 til 2025.

**Mynd 1| Bruttotjóðarúrtøka, broyting í % um árið, ársins prísir og fastir 2010-prísir, 2005-2025**




Viðm.: Tølini fyri 2023 til 2025 eru metingar og forsagnir og skulu lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan og metingar hjá Fíggjarmálaráðnum.

Føroyski tjóðarroknskapurin er gjørdur upp til og við 2022. Í 2022 varð búskapurin stimbraður av óvanliga høgum matvøruprísum og harvið prísum á vørum, sum verða útfluttar úr Føroyum. Hetta gav óvanliga stóran vøkstur í bruttotjóðarúrtøkuni í ársins prísum í 2022. Í føstum prísum var talan um vøkstur á 5,4%. Størsta orsakin til stóra vøksturin í 2022 var, at útflutningurin hækkaði um 2,4 mia. kr. í virði ella um 24%. Harafturat hava almennar og privatar íløgur stimbrað vøksturin bæði í 2022 og 2023.

Bruttotjóðarúrtøkan vaks sambært metingum um 5,5% í 2023 í ársins prísum. Fíggjarmálaráðið roknar við, at BTÚ hækkar um 4,5% í 2024 og um 4% í 2025 (ársins prísir). Væntaði vøksturin í 2024 og 2025 er treytaður av gongdini í altjóða búskapinum og serliga av viðurskiftum, sum hava við russisku innrásina í Ukraina at gera, umframt at prísvøksturin og gongdin í rentustøðinum koma at ávirka gongdina. Við væntaða prísvøkstrinum kann roknast við vøkstri í føstum prísum á um 2% í 2024 og 2025.

Uppgerðirnar av tjóðarroknskapinum í føstum prísum vísa, at búskaparvøksturin í Føroyum hevur verið nakað størri enn í hinum Norðurlondunum síðstu um 15 árini. Tað sæst í mynd 2 niðanfyri, har londini byrja við sama vísitali 100 í 2008.

Prísvøksturin innan matvørur í 2022 og 2023 hevur stimbrað føroyska útflutningin og búskapin. Harafturat er býtislutfallið batnað bæði í 2022 og 2023. Hetta merkir, at prísirnir á útfluttum vørum eru hækkaðir sammett við prísirnar á innfluttum vørum. Prísvøksturin er minkaður munandi aftur annað hálvár 2023 og í 2024. Reala inntøkan hjá vanligum húsarhaldum er aftur vaksandi, eftir at stórar lønarhækkingar eru avtalaðar á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum. Samstundis er prísvøksturin minkaður munandi soleiðis, at avtalaðu lønarhækkingarnar eru størri enn prísvøksturin. Harafturat er skattaumskipan samtykt, sum fer at hækka tøku inntøkuna hjá

flestu húsarhaldum í 2024 og 2025. Útlit eru til, at keypsorkan hjá vanligum húsarhaldum í 2025 kemur aftur á støðið frá 2021 og 2022 áðrenn stóra prísvøkstrurin, sum var í 2022 og 2023.

**Mynd 2| BTÚ í føstum prísum, býtt á lond 2008 = 100, 2008 til 2023, forsagnir og metingar eftir 2023**




Viðm.: Uppgerðirnar fyri árini 2023 til 2025 eru metingar og forsagnir og skulu lesast við fyrivarnum.
Kelda: Hagstovan, OECD (2024), Real GDP forecast (indicator) og Danmarks Nationalbank, Udsigter for dansk økonomi, mars 2024.

Síðani ársbyrjan í ár er prísurin á brent-olju hækkaður úr um 77 USD fyri fatið til nú um 86 USD fyri fatið. Prísurin var annars omanfyri 90 USD fyri fatið í september 2023.

Síðstu árini er munandi ískoyti til vøksturin komið frá privatum og almennum íløgum. Hugsandi er, at óvissan um útlitini næstu 1-3 árini og rentuhækkingarnar, sum hava verið, kunnu ávirka hugin hjá fyritøkum og húsarhaldum at gera stórar íløgur, men roknast kann framvegis við nógvum almennum og privatum íløgum næstu 1-2 árini.

Síðstu árini er privata nýtslan vaksin javnt og støðugt, men tann gongdin vendi í 2022. Stóri prísvøksturin í 2022 og 2023 gjørdi, at vøksturin í privatu nýtsluni hæsaði av og mestsum steðgaði. Av tí, at útlit eru til stóran reallønarvøkstur í 2024 og 2025, roknar Fíggjarmálaráðið við, at eitt ávíst ískoyti verður til búskaparvøksturin frá privatari nýtslu í 2024 og í 2025. Hugsandi er eisini, at samtykta skattaumskipanin í 2024 og 2025 fer at stimbra privatu nýtsluna.

Flestu forsagnir benda á, at prísvøksturin heldur fram at minka í 2024, og at prísvøksturin verður 2-3% bæði í 2024 og 2025. Væntanir eru um, at miðbankarnir í USA og Evropa fara at lækka leiðandi renturnar eina ella tvær ferðir í 2024, tó at útlit ikki eru til stórar rentulækkingar.

Tekin eru framvegis um fløskuhálsar í pørtum av búskapinum. Fløskuhálsarnir kunnu stimbra prísvøksturin og lønarhækkingarnar. Fløskuhálsar síggjast á arbeiðsmarknaðinum, á bústaðamarknaðinum og í pørtum av byggivinnuni. Grundað á trotið á arbeiðsmegi í nógvum vinnugreinum roknar Fíggjarmálaráðið framhaldandi við lágum arbeiðsloysi næstu 1-2 árini.

Skuldin hjá føroyskum húsarhaldum og vinnufyritøkum er ikki høg, sammett við privata skuld í øðrum londum í vesturheiminum. Skuldin hjá føroyskum húsarhaldum (brutto) kann metast til 50-55% av BTÚ. Húsarhaldsskuldin í Danmark, Íslandi og Noregi er 75-85% av BTÚ. Í ES er húsarhaldsskuldin í miðal um 55% av BTÚ.

Síðsta árið eru bruttoútlán úr føroyskum peningastovnum til húsarhald í Føroyum vaksin um 8% (ikki íroknað realkredittlán úr Danmark), meðan bruttoútlán til vinnukundar eru vaksin um 4% (mynd 3). Realkredittlánini til føroysk húsarhald eru minkað um 9% síðsta árið. Vøksturin í realkredittlánunum steðgaði miðskeiðis í 2022 (mynd 3B).

**Mynd 3| Inn- og útlán til húsarhald og vinnufeløg, føroyskir peningastovnar, mia. kr., sept-2013 til jan-2024**




Viðm.: Nettoinnlánini í *mynd B* eru innlán frá húsarhaldum frádrigin útlán til húsarhald í *mynd A*.
Kelda: Hagstovan.

Frá 2019 til 2022 vuksu realkredittlánini til føroysk húsarhald munandi, men rentuhækkingarnar á realkredittlánum síðsta árið hava gjørt, at húsarhald nú í størri mun velja bankalán til fígging av bústøðum heldur enn realkredittlán (mynd 3B). Tað er eisini ein høvuðsorsøk til vøksturin í útlánunum frá føroyskum peningastovnum til føroysk húsarhald. Innlán hjá føroyskum húsarhaldum eru vaksin um 3% síðsta árið, og innlán hjá føroyskum vinnufyritøkum eru vaksin um 1% síðsta árið.

**Mynd 4| Nýbygging av bústøðum um alt landið, nýíbindingar í elkervið hjá SEV, 1998 til 2023**




Viðm.: Myndin vísir nýíbindingar í elkervið hjá SEV um alt landið. Myndin fevnir um sethús, raðhús og íbúðir.
Kelda: Hagstovan.

Sethúsaprísir eru hækkaðir nógv síðstu árini um alt landið til 2022. Ábendingar eru um, at sethúsaprísir í Havn lækkaðu nakað í 2023, meðan teir helst hækkaðu í miðal í øllum landinum.

Sostatt er munurin millum húsaprísir í Havn og á smærri plássum minkaður síðsta árið. Nógv bendir á, at húsaprísirnir fyribils hava funnið eina legu í Havn, meðan teir sambært húsameklarum framvegis hækka uttanfyri høvuðsstaðarøkið. Mest sannlíku orsakirnar eru rentuhækkingarnar í 2022 og 2023, og at vegakervið er útbygt.

Síðstu árini er útboðið av nýggjum bústøðum ikki vaksið í sama mun sum eftirspurningurin. Fólkatalið er vaksið við um 6.500 fólkum síðani 2014, meðan bygdar eru um 1.800 nýggjar búeindir sama tíðarskeið sambært tølunum frá SEV fyri nýíbindingar í elkervið (mynd 4). Um lagt verður til grund, at um 2,8 fólk eru í hvørjum húski í miðal, røkka 1.800 búeindir til eini 5.000 fleiri fólk. Tí er talið av nýggjum búeindum ikki vaksið í sama mun, sum tørvurin er vaksin orsakað av fólkavøkstrinum síðani 2014.

Virksemið í byggivinnuni er framvegis vaksandi. Fleiri stórar byggiverkætlanir eru í gongd, og fleiri eru væntandi næstu árini. Til dømis kann roknast við, at tørvur verður á at byggja nógvar bústaðir næstu árini, bæði eigarabústaðir og leiguíbúðir. Sambært konjunkturvísitalinum hjá Hagstovuni siga fyritøkur í byggivinnuni frá, at eftirspurningurin er omanfyri miðal. Um onnur hvør fyritøka í byggivinnuni sigur frá, at mangul á arbeiðsmegi er størsta avmarkingin fyri at økja framleiðsluna. Fyritøkur í byggivinnuni rokna við at fáa størri tørv á arbeiðsmegi næsta árið.

*Roknast kann við óbroyttum ískoyti til vøksturin frá útflutningsvinnunum í 2024 og 2025*

Fíggjarmálaráðið roknar við, at at ískoytið til vøksturin frá útflutningsvinnunum verður mestsum óbroytt í 2024 og aftur í 2025. Ískoytið frá uppsjóvarvinnuni fer møguliga at minka nakað næstu 1-2 árini. Hinvegin eru útlit til, at tøkan av aldum laksi veksur bæði í 2024 og aftur í 2025.

Roknast kann við, at útflutningurin av sild og toski lækkar í 2024 og 2025 orsakað av minkandi kvotum av norðhavssild og minkandi botnfiskakvotum í Barentshavinum. Hinvegin er ikki óhugsandi, at prísirnir á sild, toski og laksi fara at hækka nakað í 2024.

Makrelstovnurin hevur verið ovtroyttur av strandalondunum í fleiri ár, meðan eingin semja hevur verið millum strandalondini. Síðstu árini hevur tilgongdin av makreli verið góð, men stóra veiðan kann ikki halda fram í nógv ár aftrat. Neyðugt verður tí, at strandalondini semjast um býtið av makrelkvotuni og lækka heildarkvotuna.

Roknað verður við, at tøkan av aldum laksi hækkar um 10% í 2024, og Fíggjarmálaráðið roknar við, at tøkan hækkar nakað aftur í 2025. Prísirnir á aldum laksi fyrstu mánaðirnar í 2024 hava verið nakað omanfyri prísirnar somu tíð í 2023, og roknast kann eisini við høgum prísum restina av árinum, tó at tað er sera torført at meta um. Væntað verður, at altjóða útboðið av aldum laksi í 2024 fer at vaksa um 2%, sum er væl minni enn vøksturin í eftirspurninginum. Samanumtikið kann roknast við, at ískoytið til vøksturin frá alivinnuni veksur nakað í 2024 og 2025.

Síðstu árini eru stórar íløgur gjørdar í smoltstøðir og kryvjivirki, og næstu 1-2 árini verða eisini gjørdar stórar íløgur. Úrslitini av íløgunum síggjast í størri tøku, og miðalstøddin á smoltum, sum verða sett út, er hækkað úr um 200 gramm í 2016 til um 450 gramm í 2023. Útbyggingarnar hava við sær, at framleiðslan av smolti á landi kann vaksa, at miðalstøddin á smoltum veksur til um 500 gramm, og at vakstrartíðin á sjónum er minkað úr um 18 mánaðir í 2014 til nú um 12 mánaðir.

Árliga tøkan av alilaksi var millum 60 og 78 tús. tons í kruvdari vekt frá 2012 til 2020. Í 2021 vaks tøkan til út við 95 tús. tons í kruvdari vekt. Síðani er tøkan lækkað nakað aftur til um 80 tús. tons í

2022, sum eisini var tøkan í 2023. Mynd 5 niðanfyri vísir tøku av aldum laksi síðani 1996 og mettu tøkuna í 2024.

Serliga fyrru helvt av 2022 vóru miðalprísir á aldum laksi óvanliga høgir, sum kom av høgum matvøruprísum orsakað av russisku innrásini í Ukraina. Miðalprísurin á fishpool vísitalinum var um 8,3 EUR/kg í 2023, og higartil í 2024 hevur miðalprísurin verið um 9,8 EUR/kg. Viðmerkjast skal, at vanliga eru altjóða prísirnir á aldum laksi hægst fyrsta ársfjórðing og síðani nakað lægri restina av árinum. Útlitini fyri prísgongdina restina av 2024 eru sum heild góð, tó at prísirnir kunnu lækka nakað í mun til verandi støði.

**Mynd 5| Tøka av aldum laksi og sílum í kruvdari vekt, býtt á ár, 1996 til 2023**




* Tøkan er í kruvdari vekt í tonsum.
Kelda: Hagstovan og Búskaparráðið.

Sambært stovnsmetingum hjá Havstovuni hevur toskastovnurin á Landgrunninum verið undir søguligum lágmarki síðani 2004. Í 2018 var toskastovnurin oman fyri lágmarksstødd av gýtingarstovninum, men síðan 2019 hevur stovnsmetingin víst, at stovnurin er aftur undir hesum marki. Samanumtikið væntast toskastovnurin ikki at vaksa næstu 1-2 árini, sum annars hevur verið væntað. Føroyski hýsustovnurin var í tíðarskeiðnum frá 2008-2017 undir markinum, har serlig verjutiltøk eru neyðug. Hýsustovnurin kom upp um markið í 2018 og hevur verið í vøkstri síðan.

Samanumtikið metir Fíggjarmálaráðið ikki, at útlit eru til stórvegis ískoyti til búskaparvøksturin frá botnfiskaveiðini undir Føroyum næstu árini.

### *Gongdin á arbeiðsmarknaðinum*

Arbeiðsmarknaðurin í Føroyum er framvegis væl fyri. Við tað meinast, at arbeiðsloysið framvegis er ómetaliga lágt allastaðni í landinum, at løntakaratalið er methøgt, og annars at arbeiðsmegin er flytfør millum vinnugreinar og ymisk øki í landinum. Tó er trýstið á arbeiðsmarknaðin sera stórt í løtuni, og trot er á arbeiðsmegi í fleiri vinnugreinum. Til dømis er trot á faklærdari arbeiðsmegi, og handilsvinnuni og privatu tænastuvinnunum tørva eisini meira arbeiðsmegi.

Trýstið á arbeiðsmarknaðin er ein av fløskuhálsunum í búskapinum og forðar fyri, at framleiðslan kann vaksa meira. Arbeiðsloysið hevur verið um 1% í 2-3 ár, sí mynd 6.

Arbeiðsloysið við ársskiftið 2023/24 var 0,8% av arbeiðsfjøldini (mynd 6A). Arbeiðsloysið vaks nakað í 2020 og 2021, tá ið korona ávirkaði, men arbeiðsloysið minkaði skjótt aftur seinna hálvár

2021 og er nú tað minsta, sum er skrásett síðani miðskeiðis í 1990'unum, tá ið skrásetingarnar byrjaðu. Harafturat er arbeiðsloysið lágt um alt landið.

**Mynd 6| Árstíðarjavnað arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld, jan-2005 til jan-2024**




Kelda: Hagstovan.

Talið á løntakarum er eisini methøgt um 28 tús. (árstíðarjavnað). Løntakaratalið lækkaði miðskeiðis í 2020 orsakað av koronufarsóttini, men síðani er løntakaratalið vaksið støðugt aftur (mynd 6B).

**Mynd 7| Lønargjaldingar, býttar á ársfjórðingar, 1. ársfjórðing 2000 til 4. ársfjórðing 2023**




Viðm.: Mynd A vísir samlaðar lønargjaldingar í øllum vinnugreinum 1. ársfjórðing 2000 til 4. ársfjórðing 2023.
Mynd B vísir lønargjaldingar í fýra útvaldum vinnugreinum 1. ársfjórðing 2000 til 4. ársfjórðing 2023.
Kelda: Hagstovan.

Gongdin í lønargjaldingum fyri árini 2020 til 2023 og býtt á høvuðsvinnubólkar sæst í talvu 1. Samanumtikið vuksu lønargjaldingarnar út við 6% í 2023. Serliga lønargjaldingar innan byggivinnu og aðra tilvirking og fiski- og alivinnu vuksu í 2023 (mynd 7B og talva 1). Lønargjaldingarnar hækkaðu 4-5% bæði í privatu og almennu tænastuvinnunum. Í byggivinnuni vuksu lønargjaldingarnar 8% í 2023.

**Talva 1| Lønargjaldingar eftir høvuðsvinnubólkum, 2020-2023, mió. kr.**

| Vinnugrein | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | Munur 2022-23 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 1.968 | 1.973 | 2.199 | 2.368 | 169 | 7,7 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 1.722 | 1.659 | 1.698 | 1.837 | 139 | 8,2 |
| Privatar tænastuvinnur | 3.116 | 3.348 | 3.474 | 3.619 | 145 | 4,2 |
| Almenn o.o. tænasta | 3.465 | 3.667 | 3.821 | 4.008 | 187 | 4,9 |
| **Lønargjaldingar tilsamans** | **10.271** | **10.646** | **11.192** | **11.831** | **639** | **5,7** |

Kelda: Hagstovan.

Talið av løntakarum vaks frá 2014 til 2020 (mynd 6B) til út við 27 tús. løntakarar. Talið av løntakarum lækkaði síðani til um 25 tús. í apríl 2020 orsakað av koronufarsóttini. Síðani er talið av løntakarum vaksið aftur til um 28 tús. Nevnast kann, at persónar, sum bara hava B-inntøku ella sum bara hava inntøku uttanlands eru ikki íroknaðir í talið á løntakarum í mynd 6 ella í talvu 2.

**Talva 2| Løntakarar í januar eftir høvuðsvinnubólkum, 2021-2024, fólk í tali**

| Vinnubólkur | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Munur 2023-24 | Munur í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 3.944 | 3.893 | 3.971 | 3.937 | -34 | -0,9 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 4.086 | 4.035 | 4.141 | 4.269 | 128 | 3,1 |
| Privatar tænastuvinnur | 8.466 | 8.756 | 8.813 | 8.851 | 38 | 0,4 |
| Almenn o.o. tænasta | 9.930 | 10.133 | 10.394 | 10.607 | 213 | 2,1 |
| **Løntakarar tilsamans** | **26.426** | **26.817** | **27.319** | **27.664** | **345** | **1,3** |

Kelda: Hagstovan.

Talva 2 vísir gongdina í løntakarum í januar, býtt á høvuðsvinnugreinar síðani 2021. Síðani 2021 er løntakaratalið vaksið mest innan almenna o.a. tænastu og í privatu tænastuvinnunum. Vøksturin í løntakaratalinum í byggivinnuni steðgaði miðskeiðis í 2020, tá ið koronufarsóttin byrjaði, og fleiri stórar byggiverkætlanir vóru liðugt bygdar. Síðani kom meira ferð á aftur byggivinnuna í 2022, og fleiri stórar byggiverkætlanir eru í gongd, og fleiri eru ávegis. Løntakaratalið í byggivinnuni er vaksið um 3% síðsta árið.

### *Eftirspurningur og brúkaraprísir*

Tekin eru um, at stígur er komin í vøksturin, sum hevur verið í eftirspurninginum frá húsarhaldum. Flestu hagtøl benda á, at privata nýtslan hevur verið støðug síðstu umleið tvey árini (mynd 8). Størsta orsakin til, at stígur er komin í vøksturin í privatu nýtsluni, er helst prísvøksturin og

rentuhækkingarnar, sum hava ávirkað í 2022 og 2023. Hagtøl fyri vøruinnflutning benda á, at eftirspurningurin í Føroyum vaks nógv í tíðini við korona í 2020 og 2021, og at vaksturin síðani er hæsaður av. Til dømis sæst í mynd 8, at innflutningurin av drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum, íroknað akfør, er ikki vaksin í ársins prísum síðani 2021. Um hugsað verður um prísvøksturin, sum var í 2022 og 2023, merkir hetta, at innflutningurin av tílíkum vørum er minkaður í føstum prísum síðstu um 2 árini.

**Mynd 8| Innflutningur av nýtsluvørum og útgoldnar lønir, jan-1998 til jan-2024**




Viðm.: Myndin vísir 12-mánaðar samanløgd tøl fyri tær tríggjar strikurnar í myndini.
Kelda: Hagstovan.

Innflutningurin til beinleiðis húsarhaldsnýtslu vaks um 3% í 2023 í virði, sum er lítil vøkstur, um hugsað verður um stóra prísvøksturin í 2023. Sambært handilsvinnuni hava húsarhald tillagað sína nýtslu til prísvøksturin, sum hevur verið síðstu tvey árini. Húsarhald keypa tí bíligari og heldur færri vørur og hava skorið tað burtur av nýtsluni, sum lætt bar til at skera burtur.

**Mynd 9| Smásøla í føstum prísum, býtt á vørubólkar og ársfjórðingar (trendur), 2005 = 100, 2005 til 2022**




Kelda: Hagstovan.

Fíggjarmálaráðið metir, at eftirspurningurin frá húsarhaldunum fer at vaksa nakað næstu 1-2 árini, men ráðið roknar ikki við stórum vøkstri í privatu nýtsluni. Metingin er grundað á, at prísvøksturin er lækkaður og væntast at vera verandi lágur næstu 1-2 árini.

Harafturat eru stórar lønarhækkingar avtalaðar á almenna og privata arbeiðsmarknaðinum, sum fara at hava við sær hægri reallønir og meira tiltøkupening fyri flestu húsarhald. Aftrat hesum kemur samtykta skattaumskipanin í 2024 og 2025, sum fer at hava somu ávirkan. Roknast kann eisini við rættiliga støðugum rentum næstu 1-2 árini. Fíggjarmálaráðið roknar tí við, at ískoytið frá privatu nýtsluni til búskaparvøksturin fer at vaksa nakað næstu 1-2 árini.

Á mynd 9, sum vísir hagtøl yvir smásølu í føstum prísum fyri ymiskar vørubólkar, sæst, at privati eftirspurningurin hækkaði í 2020 og 2021 undir korona og er síðani lækkaður aftur. Smásøla er søla hjá handlum til privata nýtslu og lýsir gongdina í umsetninginum og broytingar í seldum mongdum. Myndin vísir, at privati eftirspurningurin er lækkaður nakað í 2022 og 2023.

Sambært konjunkturkanningini frá Hagstovuni í januar 2024 hevur vísitalið fyri brúkaravæntanirnar verið óbroytt síðani í januar 2023 (mynd 10B). Flestu húsarhald rokna við, at teirra fíggjarstøða og búskaparstøðan í Føroyum vera at kalla óbroytt, ella at støðan versnar nakað næsta árið. Mynd 10 vísir samanvigaða vísitalið og vísitalið fyri húsarhald. Samanvigaða konjunkturvísitalið fyri vinnu og húsarhald lækkaði frá 6 til -1 í síðstu konjunkturkanningini (mynd 10A).

**Mynd 10| Samanvigað konjunkturvísital og vísital fyri húsarhald, jan-2006 til jan-2024**




Kelda: Hagstovan.

**Mynd 11| Konjunkturvísital fyri handils- og tænastuvinnu, jan-2006 til jan-2024**




Kelda: Hagstovan.

Eitt annað tekin um tvørrandi eftirspurning frá húsarhaldunum er konjunkturvísitalið fyri handilsvinnuna og tænastuvinnuna. Bæði vísitølini eru lækkað síðstu 1-2 árini. Gongdin er víst í mynd 11. Á myndini sæst eisini, at handilsvinnan væntar lækkandi sølu og eftirspurning næsta árið.

Brúkaraprístalið var rættiliga støðugt frá 2009 til 2021, men seinna hálvár 2021 hækkaði prístalið nógv, og prísvøksturin helt fram og tók dik á seg í 2022. Ársmiðal prísvøksturin var út við 8% í 2022 og út við 5% í 2023. Brúkaraprístalið er víst í mynd 12 niðanfyri.

**Mynd 12| Brúkaraprístalið, 1. ársfjórðing 2001 til 4. ársfjórðing 2023, býtt á ársfjórðingar, indeks 2001 = 100**




Kelda: Hagstovan.

Týdningurin av brennievni í føroyska innflutninginum er stórur, tí um 15% av innflutninginum í 2023 var brennievni og tílíkt. Rentustøðið hevur eisini stóra ávirkan á gongdina í brúkaraprísum og serliga á kostnaðin av at eiga ella leiga sær bústað. Síðstu tvey árini er rentustøðið hækkað munandi, sum sæst aftur í brúkaraprístalinum.

### *Gongdin í til- og fráflyting*

Nettotilflyting er framvegis til landið, tó at hon er minkað munandi síðani tíðliga í 2022. Nettotilflytingin var 4-500 fólk árliga frá 2017 til 2022. Síðstu tvey árini er nettotilflytingin minkað til undir 300 fólk árliga (mynd 13). Harafturat er tilflytingin broytt soleiðis, at í løtuni er nettofráflyting av donskum ríkisborgarum, meðan tilflyting er av útlendskari arbeiðsmegi. Í 2023 minkaðu bæði tilflyting og fráflyting, men størra minkingin var í tilflytingini.

Gongdin við nettotilflyting og fólkavøkstri, sum byrjaði í 2014, hæsaði sostatt av í 2022, og nógv bendir á, at nettotilflytingin og fólkavøksturin fara at halda fram at minka næstu 1-2 árini, tó at sera torført er at meta um tað. Burðaravlopið hækkaði nakað í 2023, sum serliga kom av lægri tali av deyðum.

Talið av føddum er lækkað nógv síðstu tvey árini. Lækkandi talið av føddum børnum frá 685 í 2021 til 574 í 2023 hevur gjørt, at føðitíttleikin er lækkaður frá um 2,6 barn í miðal fyri hvørja kvinnu í burðarførum aldri í 2016 til nú um 2 barn í miðal, sum er eitt sera stórt fall eftir so fáum árum.

**Mynd 13| Nettoflyting til Føroyar, 12 mánaðir samanlagt, til- og fráflyting, jan-2007 til des-2023**




Viðm.: Grønu og reyðu stabbarnir vísa ávikavist til- og fráflyting hvønn mánaða.
Kelda: Hagstovan.

Nettotilflytingin er framvegis á áleið sama støði sum árini eftir aldaskiftið, tá ið búskapurin fótaði sær aftur eftir kreppuna í 1990'unum (mynd 14). Fráflytingin er síðstu tvey árini hækkað til um 1.500 fólk um árið, og tilflytingin í 2023 var nakað omanfyri 1.700 fólk.

**Mynd 14| Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2023**




Kelda: Hagstovan.

Gongdin við nettotilflyting til landið er tekin um, at arbeiðsmarknaðurin framvegis er væl fyri, og at fleiri størv hava tikið seg upp í landinum. Ein onnur orsøk til gongdina er, at útbúgvingarmøguleikarnir eru vorðnir betri, og at færri tí fara av landinum at útbúgva seg. Nettotilflytingin býtt á mánaðir og ár er víst í myndunum 13 og 14.

**Mynd 15| Fólkatalið í Føroyum 1. januar, 1985-2024**




Kelda: Hagstovan.

At nettotilflyting er til landið, er eitt gott tekin fyri búskapin. Heldur tilflytingin fram, betrar tað haldførið í búskapinum. Hóast nettotilflyting er til landið nú, benda framrokningar greitt á, at aldurs- og fólkasamansetingin fer at broytast næstu árini, soleiðis at lutfalsliga færri fólk vera í arbeiðsførum aldri. Tað er eisini orsakin til, at stórar avbjóðingar eru við haldførinum í almenna búskapinum, hóast tilflyting er, og fólkatalið helst fer at hækka nakað næstu árini.

**Talva 3| Fólkatalið býtt á øki í landinum, 1. feb. 2023 til 1. feb. 2024**

| Øki í landinum | Fólkatal 1. feb. 2023 | Burðaravlop | Nettoflyting | Fólkatal 1. feb. 2024 | Broyting í tali | Broyting í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðoya øki | 6.399 | 14 | 38 | 6.451 | 52 | 0,8 |
| Eysturoyar øki | 12.405 | 56 | 90 | 12.551 | 146 | 1,2 |
| Tórshavnar økið | 21.038 | 59 | 207 | 21.304 | 266 | 1,3 |
| Streymoyarøkið annars | 4.960 | 27 | -35 | 4.952 | -8 | 0,0 |
| Vága øki | 3.422 | 14 | 3 | 3.439 | 17 | 0,5 |
| Sandoyar øki | 1.258 | -3 | 28 | 1.283 | 25 | 2,0 |
| Suðuroyar øki | 4.637 | -7 | -41 | 4.589 | -48 | -1,0 |
| **Alt landið** | **54.119** | **160** | **290** | **54.569** | **450** | **0,8** |

Viðm.: Tórshavnar økið er í hesum føri Tórshavn, Hoyvík og Argir.
Kelda: Hagstovan.

Á mynd 15 omanfyri sæst, at fólkatalið í Føroyum nærkast 55 tús. (sí eisini talvu 3). Myndin vísir eisini, at fólkatalið ikki hækkaði stórvegis tey 25 árini frá 1990 til 2014. Síðani 2014 hevur verið støðugur fólkavøkstur eins og árini um aldaskiftið, tá ið búskapurin fótaði sær aftur eftir kreppuna í 1990'unum. Minkingin í nettotilflytingini og í fólkavøkstrinum síðsta árið eru kortini ein áminning um, at fráflyting og fólkaminking kunnu taka seg uppaftur, eins og støðan var árini 2004 til 2013.

Størsti parturin av fólkavøkstrinum síðstu árini hevur verið í miðøkinum í landinum og serstakliga í høvuðsstaðarøkinum og í Eysturoynni. Ein broyting síðstu tvey árini hevur verið, at nettotilflyting nú er til Sandoynna. Broytingin er helst komin av útbyggingunum av vegakervinum. Á mynd 16 er víst, at síðstu 10 árini hava Suðuroyggin og Sandoyggin ikki havt sama fólkavøkstur sum onnur øki í landinum. Í talvu 3 síggjast broytingar í fólkatalinum síðstu 12 mánaðirnar, býtt á høvuðsøki.

**Mynd 16| Broyting í fólkatali í % frá 1. jan. 2015 til 1. feb. 2024 tilsamans, býtt á øki í landinum**




Viðm.: Tórshavnar økið er í hesum føri Tórshavn, Hoyvík og Argir.
Kelda: Hagstovan.

## Viðskifti við útlond, handils- og gjaldsjavni

Gongdin á handils- og gjaldsjavnanum síðstu árini er merkt av, at býtislutfallið í uttanríkishandlinum er batnað munandi síðstu nógvu árini. Síðani 2022 eru prísir á bæði útflutnings- og innflutningsvørum hækkaðir munandi. Í miðal eru prísirnir á vørum, sum verða útfluttar úr Føroyum, tó helst hækkaðir meira enn prísirnir á innfluttum vørum. Býtislutfallið versnaði tó helst í 2020 og 2021 av høgum oljuprísum tey árini.

**Mynd 17| Innflutningur og útflutningur av vørum, mió. kr., 1988 til 2023**




Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur; tænastur eru sostatt ikki við í uppgerðini av handilsjavnanum.
Kelda: Hagstovan.

Síðani 2013 hava avlop verið á handilsjavnanum. Í 2022 hækkaðu bæði útflutningur og innflutningur munandi, millum annað orsakað av prísvøkstrinum. Í 2023 vaks útflutningurin aftur nakað, meðan innflutningurin sambært fyribils uppgerðum minkaði nakað í 2023. Innflutningurin minkaði í 2023, serliga orsakað av lægri oljuprísum. Roknast kann við, at avlop eisini verður á handilsjavnanum í 2024.

Myndirnar 17 og 18 vísa gongdina í handils- og gjaldsjavnanum síðstu árini. Handilsjavnin fevnir um vøruhandil við útlond; tænastuveitingar til og frá útlondum eru sostatt ikki taldar við í handilsjavnan. Tænastuveitingar eru hinvegin taldar við í *vøru- og tænastujavnan*. Uppgerðir hjá Hagstovuni av tænastujavnanum benda á, at Føroyar hava hall á tænastujavnanum við útlond á út við eina mia. kr. árliga, tó at nakað av óvissu er um hesa uppgerðina.

**Mynd 18| Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans í mió. kr., 1998 til 2023**




* Talið fyri 2023 er meting og skal lesast við fyrivarni.
Kelda: Hagstovan.

Handilsjavnin sveiggjar nógv frá ári til ár, alt eftir privatari nýtslu, íløgum í vinnulívinum, oljuprísum og útflutningsvirðinum á fiski og aldum laksi. Eins og víst í mynd 17 omanfyri, er føroyski útflutningurin vaksin úr um 7 mia. kr. í 2015 til um 13 mia. kr. í 2023. Helst hækkar útflutningurin aftur í 2024. Útflutningurin er sostatt út við tvífaldaður síðani 2015 í ársins prísum.

## Heimsbúskapurin

Útlitini fyri búskaparvøkstri í 2024 og 2025 eru framvegis óviss, men ábendingar eru hóast alt um hóvligan vøkstur í heimsbúskapinum næstu 1-2 árini. Prísvøksturin er minkaður orsakað av rentuhækkingunum, sum miðbankar í USA og Evropa hava sett í gongd. Væntanir eru um, at prísvøksturin heldur fram at minka í 2024, og at hann verður støðugur í 2025.

Talva 4 vísir metingar og forsagnir hjá OECD um búskaparvøkstur í 2024 og 2025. Roknast kann við, at heimsbúskapurin veksur um 3% í 2024 og í 2025. Búskapurin í Evropa vaks sambært metingum um 0,5% í 2023 og veksur væntandi um 1% í 2024 og um 2% í 2025. Í USA kann roknast við búskaparvøkstri á um 2% í 2024 og í 2025.

Væntað verður, at privata nýtslan og privatar íløgur fara at stimbra búskapirnar í 2025. Roknast kann ikki við, at privata nýtslan í sama mun fara at stimbra búskapin í USA næstu 1-2 árini.

**Talva 4|** **Árligur vøkstur í BTÚ í føstum prísum 2020-2025, býtt á lond og øki**

| *% um árið í føstum prísum** | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| USA | -2,8 | 5,9 | 1,9 | 2,5 | 2,1 | 1,7 |
| Evruøkið | -6,1 | 5,6 | 3,4 | 0,5 | 0,9 | 1,7 |
| Týskland | -3,8 | 3,2 | 1,8 | -0,3 | 0,5 | 1,6 |
| Bretland | -11,0 | 7,6 | 4,3 | 0,5 | 0,6 | 1,6 |
| Danmark | -2,4 | 6,8 | 2,7 | 1,8 | 2,4 | 1,4 |
| Heimsbúskapurin | -2,8 | 6,3 | 3,5 | 3,1 | 3,1 | 3,2 |

* Uppgerðirnar fyri árini 2023 til 2025 eru metingar og forsagnir.
Kelda: IMF World Economic Outlook, Update, January 2024. Tølini fyri Danmark í 2024 og 2025 eru metingar og forsagnir hjá danska Tjóðbankanum, Danmarks Nationalbank, Udsigter for dansk økonomi, 20. marts 2024.

Búskapirnir í USA og í nógvum londum í Evropa hava víst seg at vera meira mótstøðuførir enn væntað móti høga prísvøkstrinum og rentuhækkingunum, sum hava merkt árini 2022 og 2023. Privata nýtslan og íløgur eru ikki lækkaðar eins nógv og væntað, tá ið miðbankarnir byrjaðu at hækka leiðandi renturnar.

Hægri rentustøði, prísvøkstur og óvissa um útlitini ávirka kortini framvegis húsarhald og vinnulív, serliga í Evropa, og roknað verður við avmarkaðum og hóvligum vøkstri í privatu nýtsluni og í privatu íløgunum næstu 1-2 árini. Hugsandi er til dømis, at ein ávís tíð gongur, áðrenn rentuhækkingarnar í 2022 og 2023 fara at ávirka privatu íløgurnar.

Stígur kom í búskaparvøksturin í Evropa í 2023. Londini eru í ymiskan mun ávirkað av russisku innrásini í Ukraina, prísvøkstrinum og rentuhækkingunum. Eisini er ymiskt, hvussu londini í Evropa hava verið og eru ávirkað av óstøðugu marknaðunum fyri orku og gassi og prísum á marknaðunum. Bæði í USA og Evropa eru fløskuhálsar á arbeiðsmarknaðinum, sum tálma búskaparvøkstrinum.

Vøksturin er minkaður serliga í Týsklandi, Svøríki og Bretlandi. Størsta orsøkin til lága vøksturin er, at stígur er komin í privatu nýtsluna orsakað av rentuhækkingunum. Nevnast kann, at í Bretlandi og Svøríki hava húsarhald merkt rentuhækkingarnar týðuliga, tí nógv húsarhald hava lutfalsliga nógva skuld, umframt at stórur partur av lánunum eru við broytiligari rentu. Harafturat eru íløgur í nýggjar bústaðir minkaðar nógv í flestu londunum í Evropa og í USA.

Eisini kann nevnast, at í flestu londum í Evropa er privata nýtslan í føstum prísum framvegis á sama stigi sum í 2019. Í USA er privata nýtslan vaksin nakað síðsta árið, hóast stóra prísvøksturin, og hóast rentustøðið er hækkað.

Roknað verður við, at almenni fíggjarpolitikkurin í Evropa verður táttaður nakað í 2024, og at fleiri almennar stuðulsskipanir og veitingar, sum høvdu samband við prísvøksturin í 2022 og 2023, verða settar úr gildi aftur. Men samstundis verður neyðugt at gera stórar almennar íløgur í grøna orkuskiftið, verju- og trygdarmál í Evropa og USA, sum eisini koma at stimbra búskapirnar næstu 1-2 árini.

Forsagnir benda á, at prísvøksturin í Evropa verður 2-3% í miðal í 2024 og nakað lægri í 2025. Roknað verður eisini við prísvøkstri á 2-3% í USA næstu 1-2 árini. Prísvøksturin er millum annað minkaður orsakað av lægri prísum á prísum á orku og brennievni. Prísvøksturin á tænastuveitingum er hinvegin ikki minkaður í sama mun. Sostatt er prísvøksturin áleið á tí støðinum, sum miðbankar vanliga halda vera hóskandi prísvøkstur.

Flestu forsagnir benda á, at miðbankarnir í USA og Evropa fara at lækka leiðandi renturnar eina ella tvær ferðir í 2024, og at leiðandi renturnar síðani verða støðugar ella lækka nakrar ferðir í 2025. Miðbankarnir í USA og Evropa hava eisini boðað frá, at tey stuðulstiltøk, sum miðbankarnir hava sett í verk fyri at stuðla búskapirnar síðstu árini, væntandi framhaldandi fara at minka í 2024 og 2025.

## Almenn fíggjarmál

Her verður hugt stutt eftir gongdini í úrslitinum hjá landskassanum og kommunum síðstu árini. Mynd 19 niðanfyri vísir gongdina í inntøkum og útreiðslum hjá landskassanum og RLÚ-úrslitinum síðani 1997 við mettum tølum fyri 2023, fíggjarlógartølum fyri 2024 og tølum fyri árini 2025-29 úr uppskotinum til samtyktar um játtanarkarmar fyri fíggjarárið 2025.

**Mynd 19| Úrslit landskassans, mió. kr., 1997 til 2023, játtanar- og ætlanartøl fyri 2024 til 2029**




Viðm.: Tølini fram til 2022 eru roknskapartøl. Hallið í 2023 verður mett til um 200 mió. kr. Tølini fyri 2024 eru metingar, og tølini fyri 2025 til 2029 eru úr uppskotinum til samtyktar um játtanarkarmar, sum eru íroknað átøkini at betra úrslitið og at rætta flytingar í Búskapargrunnin.
Kelda: Gjaldstovan og Fíggjarmálaráðið.

Landskassin hevði avlop frá 2016 til 2022, tó ikki í 2020, tá ið korona ávirkaði búskapin. Úrslitið hjá landskassanum fyri 2023 er ikki endaliga gjørt upp enn, men Fíggjarmálaráðið metir, at úrslitið hjá landskassanum var um 200 mió. kr. í halli í 2023. Avlopið í fíggjarlógini fyri 2024 er um 4 mió. kr., men Fíggjarmálaráðið roknar við, at landskassin fer at hava hall á um 150 mió. kr. í 2024.

Ein týðandi orsøk til hallið í 2023 var, at um 200 mió. kr. vórðu brúktar av støðlaðum løgujáttanum. Í samtyktu fíggjarlógini fyri 2023 var annars avlop á um 144 mió. kr. Inntøkurnar hjá landinum frá skattum og avgjøldum hava síðstu árini verið munandi størri enn væntað. Í 2023 var støðan kortini hon, at inntøkurnar vóru um 70 mió. kr. lægri enn mettar í fíggjarlógini.

Inntøkurnar hjá landskassanum ávirkast nógv av konjunkturgongdini, meðan útreiðslurnar hækka meira støðugt og broytast ikki í sama mun frá ári til árs. Í 2023 vuksu útreiðslurnar hjá landinum meira enn inntøkurnar, millum annað orsakað av nógvum íløguvirksemi hjá landinum, og av at tað ikki eydnaðist at selja ávís partabrøv hjá landinum, sum ætlanin annars var at selja.

Búskapargongdin var samanumtikið góð í 2023, men orsakað av ávísum viðurskiftum og umstøðum sást tað ikki aftur í úrslitinum hjá landskassanum. Eisini eigur at verða nevnt, at stígur tykist vera komin í vøksturin í privatu nýtsluni, og tað ávirkaði eisini inntøkurnar hjá landskassanum frá meirvirðisgjaldinum í 2023.

Inntøkurnar hækkaðu um 3% í 2023, og sambært fyribils tølum fyri 2023 vuksu rakstrarútreiðslurnar hjá landinum um 5%. Samlaðu útreiðslurnar hjá landinum íroknað løguútreiðslur hækkaðu út við 8% í 2023, sum serliga kom av nógva íløguvirkseminum.

Kommunurnar hava tilsamans havt hall síðani 2018. Sosialu grunnarnir hava hinvegin havt avlop samanlagt síðstu nógvu árini á 2-300 mió. kr. árliga. Úrslitini hjá kommununum fyri 2023 eru ikki gjørd endaliga upp enn, men kommunurnar høvdu sannlíkt lítið hall í 2023 tilsamans. Úrslitið hjá tí almenna tilsamans í 2023 var helst eitt lítið avlop á 150-200 mió. kr., ella um 0,6% av BTÚ.

Mynd 20 vísir gongdina í langfreistaðu skuldini (brutto) og innistandandi hjá landinum. Gongdin frá 2008 til 2014, tá ið útreiðslurnar vóru størri enn inntøkurnar, og landskassin hevði hall, sæst aftur sum vaksandi skuld tey árini. Føroyski búskapurin vaks kortini somikið nógv tey árini, at skuldin vaks ikki stórvegis sum partur av BTÚ. Nógv bendir á, at árini 2023 til 2025 vera hall í landskassanum, sum fer at síggjast aftur sum vaksandi skuld hjá landinum næstu tvey árini.

**Mynd 20| Langfreistaða skuld landskassans og gjaldføri landskassans í mió. kr., 1997 til 2023**




Viðm.: Skuldin hjá almenna felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar er íroknað landskassaskuldina frá 2017.
Kelda: Gjaldstovan, Landsbankin og Fíggjarmálaráðið.

Orsakin til lopið í skuldini hjá landinum í 2017 er lánið hjá felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar, sum verður talt við sum skuld hjá landinum. Sambært meginreglum um uppgerð av almennari skuld eigur skuldin hjá almenna felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar at verða íroknað skuldina hjá landinum. Tunnilsfelagið tók lánið síðst í 2016.

Lánið verður íroknað landskassaskuldina frá 2017, tí landið hevur veðhildið fyri lánið og rindar í løtuni eina upphædd árliga til felagið sum partur av veðhaldinum. Í løtuni er felagið P/F Eystur-

og Sandoyartunlar ikki sjálvberandi og ikki ført fyri at rinda alla skuldina aftur við egnum inntøkum. Tí verður skuldin hjá felagnum tald við í skuldina hjá landinum.

Tað almenna í Føroyum er ikki serstakliga skuldarbundið, um sammett verður við onnur lond í vesturheiminum. Bruttoskuldin hjá landinum er um 15% av BTÚ, og kommunurnar hava bruttoskuld á um 1,5 mia. kr. ella um 6% av BTÚ. Almenna felagið P/F Eystur- og Sandoyartunlar hevur harafturat skuld á um 2,4 mia. kr., ella um 9% av BTÚ, sum landið hevur veðhildið fyri.

Tað gevur tilsamans eina almenna bruttoskuld á eini 30% av BTÚ, sum er áleið tað sama sum skuldin í Danmark í % av BTÚ. Almenna bruttoskuldin í londunum í Evropa er til sammetingar um 90% av BTÚ í miðal. Almenna bruttoskuldin í Íslandi er mett til um 55-60% av BTÚ.

Fyri haldførið í almenna búskapinum er avgerandi, at nettoskuldin yvir longri áramál ikki veksur skjótari enn samlaðu inntøkurnar í samfelagnum, sum skulu fíggja rentuútreiðslurnar av skuldini.

Búskaparráðið hevur síðstu árini mett um langtíðarhaldførið í almenna búskapinum. Í nýggjastu metingini av haldførinum er nevnt, at stórar haldførisavbjóðingar framvegis eru í almenna geiranum, og at tær serliga stava frá broyttari fólkasamanseting, sum roknast kann við í framtíðini.

**Mynd 21|** **Nettoskuld landskassans (langfreistað skuld frádrigið gjaldføri) í mió. kr., 1997 til 2024**




Viðm.: Nettoskuld er í myndini víst sum langfreistaða skuldin hjá landskassanum frádrigið gjaldførið hjá landskassanum. Skuldin hjá almenna felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar er íroknað landskassaskuldina frá 2017.
Kelda: Landsbankin.

Ein broyting, sum er farin fram viðvíkjandi skuldini hjá landinum, er, at rentustøðið á skuldini er hækkað og eisini væntast at hækka næstu árini, so hvørt sum skuldin verður endurfíggjað. Við verandi rentuforsagnum verður mett, at landskassin fer at rinda út við 140 mió. kr. í rentuútreiðslum brutto í 2026.

Tá ið rentustøðið hækkar, kostar tað landi og kommunum pening í hægri rentuútreiðslum. Lánsbrævaskuldin hjá landinum er í løtuni um 3,9 mia. kr., og gjaldføri landsins er um 3,8 mia. kr. Nettoskuldin er sostatt um 100 mió. kr. umframt skuldina hjá felagnum P/F Eystur- og Sandoyartunlar. Gongdin í nettoskuldini hjá landskassanum er víst í mynd 21.